


*Børnini hugna sær í barnagarðinum, sum er væl útgjørdur til tey*

# Vala barnagarður til børnini

**Barnagarðurin í Oyndarfirði er væl útgjørdur til børnini í bygdini.**
**10 børn hava sína dagligu gongd her**

BARNAGARÐUR
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Oyndarfjørður:** Børnini tykjast hugna sær sera væl í nýggja barnagarðinum í bygdini.

Týsdagin vóru tey øll upptikin í ymiskum spæli, bæði tey yngru børnini og tey í eldra endanum.

Veðrið var einki at reypa av – vindur og regn, og í fjallatoppunum kavi.

Hetta helt kortini ikki starvsfólkunum aftur í at fara túr við nøkrum av børnunum. Børnini í Oyndarfirði hava eisini tørv á at fáa fríska luft.

Í løtuni eru 10 børn í barnagarðinum, sum er bygdur fastur í skúlan í bygdini. Hann er annars gjørdur til 15 børn.

Starvsfólkini eru tvey í tali, umframt eitt starvsfólk sum er avloysari.

## Trýstroyndur

Barnagarðurin er vælútgjørdur og hevur haraftrat fleiri smærri og størri rúm til børnini at spæla í.

Nú tað stundar til jóla eru næmingarnir í skúlanum í ferð við at rigga til ein jólaleik. Ætlanin er gera ein pall til leikin, og skal hesin framførast í stóra salinum, sum er vælegnaður til slík tiltøk.

Hesin salurin og onnur rúm vórðu annars trýstroynd í farnu viku, tá elsti maðurin í bygdini, Andreas Andreasen fór um tey 100 árini.

Dagurin hjá hesum merkismanni byrjaði við gudstænastu í Oyndarfjarðar kirkju, meðan samkoman í sambandi við dagin varð hildin í skúlanum og barnagarðinum.

Mett verður at millum 360 og 400 fólk vóru í Oyndarfirði henda dagin.



FØROYA TELE